Föroya Bjór

Föroya Bjór P/F
Klakksvíksvegur 19
Postboks 4
FO-710 Klakksvík
Faroe Islands
Phone: +298 475454
Fax: +298 475455
fb@foroyabjor.fo

Góðan dag Aksel V. Johannesen, fíggjarmálaráðharri,

Vit eru gjørd kunnug við, at í nýggju skipanini viðv. pant, sum fer at koma í gildið, er ein stór broyting íkomin í mun til verandi skipan.

Í nýggju skipanini vera pantgjøld á 2,00 kr og 4,00 kr viðgjørd sum eitt avgjald, og ikki sum nú, ein vøra sum fylgir ílatinum. Tað merkir, at framyvir skal MVG leggjast omaná panti. Tvs. at brúkarin skal rinda 2,50 og 5,00 í avgjald fyri panti, men tá hann letur pant ílat inn aftur, fær hann
einans 2,00 og 4,00 kr.

Verandi pant er ásett í kunngerð nr 54 frá 31.mai 2007, við heimild í §2, stk. 2 og §4, stk. 4 í løgtingslóg nr. 73 frá 10. Mai 1994, har ásett og positivt nevnt, at pant er áljóðandi 2,00 og 4,00 kr við MVG. Komandi pant er ásett beinleiðis í §2 í lóg nr 40 frá 16.mai 2024, har ásett er 2,00 og 4,00 kr uttan at MVG er viðmerkt.

Høgni Iversen og Rógvi Andrias Fossadal kunnaðu okkum á fundinum í nýggju panthøllini hósdagin í farnu viku um, at Taks og FMR tulka pant í nýggju skipanini sum eitt avgjald, og at hetta eftir teirra fatan ikki kann broytast. Hesa tulking vísa vit staðiliga aftur. Hon tykist hvørki at hava greiða lógarheimild ella at samsvara við endamálið við pantsskipanini. Vit krevja tí eina skrivliga og nágreiniliga grundgeving fyri hesi niðurstøðu. At ein almennur stovnur innheintar peningin kann ikki í sjálvum sær gera pant til eitt avgjald, serliga ikki tá lógin sjálv leggur upp til, at eitt privat felag eisini kann átaka sær hesa uppgávu. Ella má lógin, sum er í koming broytast, áðrenn hon verður sett í gildið

Teir báðir søgdu eisini, at panti nú skuldi innroknast í prísin. Tvs at brúkarin ikki sær hvat hann hevur goldið í pant. Niðanfyri sæst hvussu prísur verður ásettur í dag, samanborið við framyvir. Broytingin er, at framyvir skal pant, rakstrar- og handfaringargjald innroknast í listaprís:

Dømi í dag		Dømi í framtíð	
Jolly 0,5 L	10,00	Jolly 0,5 L	12,65
Pant	1,60	MVG	3,16
	11,60		15,81
MVG	2,90		
	14,50		

Tá sølustøð skulu hava avancu av listaprísinum, verður avleiðingin, at allar drykkivørur gerast munandi dýrari. Hetta er ein beinleiðis og óneyðug eyka rokning til brúkaran, og tað kann ikki góðtakast sum góður politikkur. Hetta var, eftir okkara greiðu fatan, hvørki andin í ella ætlanin við broytingini.

Á sama fundi gjørdu leiðara og stjórar fyri td. PH, PM, Effo og FK vart við, at teirra kassaskipanir ikki kunnu handfara og broytast til hesa broyting, at pant broytist til eitt avgjald. Í øllum londum rundan um okkum er pant viðgjørt sum ein vøra ið fylgir ílatinum. Vit skilja ikki, at hetta ikki eisini skal vera galdandi í Føroyum.

Vit høvdu als ikki ta fatan, tá nýggja pantsskipanin skuldi setast í verk, at hon skuldi brúkast sum ein óbeinleiðis máti hjá FMR at krevja eyka skatt/MVG frá borgaranum. Um hetta veruliga er ætlanin, eigur tað at verða sagt greitt og opið – og ikki fjalt sum ein teknisk tulking av pantinum.

Vinarliga

Einar Waag, stjóri